

*Sharon Weiss og Eyðbjørg Dalsgarð verða kanska noyddar at vera uttandura við nemingunum í frískúlanum í Havn*

# Ynsktu skúla á morgunmarknaði

**Eina heila skúlastovu ynskti fRískúlin í Havn, sum liggur á Velbastað, tá Barbara Chrisophersen, foreldur, ringdi til útvarpið hjá Kringvarpinum í morgun**

SKÚLI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

- Tað skulu nógvir næmingar koma inn í skúlan afturat í august, og tá fara vit at mangla eina stovu, so tað vit kundu hugsað okkum var eina skúlastovu. Ein skúr, pavillion ella okkurt annað, vit fáa sett upp við skúlan, har umleið 20 næmingar og 2 lærarar fáa verið, segði Barbara Christophersen við morgunsendingina hjá Kringvarpinum.

Seinni í morgun greiddi hon útvarpinum hjá Kringvarpinum frá, at ongin bjóðaði eini tílík høli fram.

- Tað gekk, sum eg hevði væntað, vit fingu onki, sum vit kundu nýta. Tað var bara ein, sum ringdi, og tað var ov lítið til eina skúlastovu, staðfesti hon.

Men tey eru ikki fallin heilt í fátt á fRískúlanum.

- Um vit ikki fáa fatur á eini í Føroyum, so mugu vit av landinum at lána ella keypa, segði Barbara Chrisphersen.

Orsøkin til, at tey nú hava ein bráfeingistørv á einum skúla, er at hin skúlin, ið skuldi byggjast, ikki verður liðugur, tá nýggir næminga skulu koma inn.

- Tað tekur longri tíð, enn mann hevur væntað, og tí verður hann ikki klárur fyri skúlabyrjan í ár, staðfesti Barbara Christophersen og legði afturat, at tey sjálvandi fara at halda fram at leita eftir eini skúlastovu.

SPEKT
løggildir grannskoðarar

## P/F Atlantic Pelagic, Klaksvík søkir bókhaldara/skrivstovufólk

at byrja sum skjótast ella í seinasta lagi 1. juni 2009.
Talan er í fyrstu atløgu um eitt hálvtíðarstarv.

**Starvið**
Starvið fevnir um:
- umsiting
- bókhald
- aðrar vanligar skrivstovu-uppgávur

Talan er um eitt áhugavert og sjálvstøðugt starv.

**Umsøkjarin**
Umsøkjarin skal:
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- hava góð samstarvsevni
- hava bókhaldsroyndir
- hava kunnleika til umsitingar-arbeiði
- kunna samskifta á enskum í skrift og talu

Fyrimunur er, um viðkomandi hevur kunnleika til bókhalds-skipanina Navision.
Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Arbeiðstíð**
Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna.

Møguleiki er fyri flekstíð.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

SPEKT
løggildir grannskoðarar Sp/f,
stílað: Árni Ellefsen
Postsmoga 3258
110 Tórshavn.

Umsóknin skal verða SPEKT í hendi í seinasta lagi 25. apríl 2009.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Árna Ellefsen á telefon 233484 ella Hjalta Hvítklett á telefon 233482.

Eisini ber til at venda sær til Pól Huus Sólstein, stjóra í P/F Atlantic Pelagic, á telefon 221458.

P/F Atlantic Pelagic er eitt sølufelag, sum hevur til endamáls at selja uppisjóvarfisk, herundir allar vørur hjá M/S Norðborg. Felagið heldur til í Klaksvík saman við reiðarínum hjá M/S Christian í Grótinum og M/S Norðborg v.fl.

Staravegur 17
Postsmoga 3258
110 Tórshavn

Telefon 34 34 34
Telefaks 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

# Ungdómurin bítur frá sær

**Føroyskur ungdómur tykist hava fingið nokk av landsins leiðslu og tess raðfestingum. Tí savna tey kreftirnar til stórt mótmælistiltak á Vaglinum í Havn í dag klokkan 16**

MÓTMÆLI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Undir heitinum »Ungdómur – størsta útflutningsvøra føroyinga?« fara lesandi á Setrinum, vinstravendu politisku ungmannafeløgini, Føroya Ungdómsráð, umframt fleiri onnur stuðulsfeløg at mótmæla skeivu gongdini nú klokkan 16 seinnapartin.

Tey lesandi á Fróðskaparsetrinum greiða soleiðis frá, um hví tey hava valt at taka hetta stig.

- Við hesum vilja vit vísa okkara ónøgd við førda politikkin á útbúgvingarøkinum í Føroyum.

- Vit mótmæla, at samgongan svíkur lyftini í samgonguskjalinum um at raðfesta útbúgving og granskingí Føroyum.

- Vit mótmæla, at Søgu og Samfelagsdeildin á Fróðskaparsetrinum skal kenna sviðan av hesum, hóast mong vilja lesa har.

- Vit mótmæla, at samgongan gongur ímóti øllum lyftum, ið allir flokkar góvu við seinasta val um, at Fróðskaparsetrið skuldi mennast til altjóða universitet.

- Vit mótmæla, at politiska skipanin er við at gera føroyska ungdómin til størstu útflutningsvøru føroyinga, við ikki at raðfesta útbúgving hægri.

Eftir mótmælistiltakið á Vaglinum, har fjølbroytt skrá er, verður boðið til kaffi í Posthúskjallaranum.

Seinni skipar Føroya Ungdómsráð fyri pallborðsfundi í Posthúskjallaranum, undir heitinum »Ungdómur – størsta útflutningsvøra føroyinga?«

### Fáa stuðul úr øllum ættum

Sera nógv ungmannafeløg, áhugafeløg og fakfeløg hava víst teirra samhuga, og stuðla tiltakinum. Stuðlarnir eru (tá blaðið fór til prentingar):

Starvsmannafelagið, Pedagogfelagið, Akademikarafelagið, Listafólkasamband Føroya (LISA), Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara, Meginfelag Føroyska Studenta, Kvinnufelagið í Havn, Føroya Ungdómsráð, Unga Tjóðveldið, Unga Sjálvstýrið og Ung fyri Miðflokkin, umframt at fleiri leggjast afturat, sum tíðin líður.

Viðmerkjast skal, at Fólkafloksungdómur, HUXA, og Unga Samband hava boðað frá, at tey ikki vilja stuðla mótmælistiltakinum.

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo



**Nýggjur skutari bíliga til sølu**

KYMCO SUPER 8 5/125.

Árg. 08/10-08, nýprísur: kr. 21.500, mm: 13 km

**Nú bert kr. 12.000. Tel. 31 59 06**